Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Sirið Stenberg, løgtingsmaður

Svarari: Jenis av Rana, landsstýrismaður í uttanríkis- og mentamálum

Evni: Næmingatalið í fólkaskúlaflokkunum

Spurningar:

1. Metir landsstýrismaðurin, at næmingatalið í fólkaskúlaflokkunum er ov høgt?
2. Um ja, eru nakrar ætlanir at minka um næmingatalið í flokkunum og nær?
3. Um nei, eru aðrar broytingar á fólkaskúlaøkinum á veg? Um ja, hvørjar?

Viðmerkingar:
Tað er onki at taka seg aftur í, at fólkaskúlin er ein av grundsúlunum í samfelagnum. Ein góður fólkaskúli er fortreyt fyri framtíðini hjá okkara børnum og harvið samfelagnum øllum, og øll ynskja vit ein góðan fólkaskúla.
Samfelagsgongdin seinnu árini hevur havt við sær, at nakrir av smáu skúlunum ikki eru virknir longur, og vit síggja eisini at nýggju skúlabyggingarnar rúma størri og størri eindum. Og tíbetur er barnatalið hækkað seinnu árini. Hinvegin frætta vit um ein sperdan fólkaskúla, at tað er trupult at fáa tillutað tørvsmetta serundirvísingartímatalið, at skúlaaftran er ein veruleiki, og at tað eru børn, sum hava trupult við at trívast, og harvið eisini kunnu verða darvað í teirra menning. Tí er spurningurin, um ein loysn hevði verið, at færri børn vóru í hvørjum flokki, so tað var betri tíð til einstaka barnið. Hetta hevði uttan iva tænt øllum pørtum, barni, lærara og samfelagnum øllum. Eitt lægri næmingatal í hvørjum flokki kundi kanska eisini virka fyribyrgjandi og minka um tørvin á øðrum sertænastum.

Á Løgtingi, 8. juni 2021

Sirið Stenberg